# Teknað føroysk andlit alt sítt lív

**Framsýning við 50 tekningum verður í Smiðjuni undan 80 ára degnum**

FRAMSÝNING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*Still going strong. Ovild Didriksen verður 80 í næstu viku og hann teknar framvegis. Nú sleppa vit at síggja nógvar av tekningum hansara.*

*Mynd Álvur Haraldsen*

Hósdagin 23. august verður eitt kent havnarandlit, Ovild Didriksen, 80 ár. Í hesum sambandi hevur Ovild, sum hevur teknað m.a. karrikaturtekningar av Palleba og Marsannuandlitum alt sítt lív, gjørt av at vísa almenninginum nakrar av teimum mongu tekningunum. Framsýningin verður í Smiðjuni í Lítluvík, frá fríggjadegnum 17. august kl. 16. og leygardagin og sunnudagin.

Hvør man ikki hava sæð henda fryntliga og dámliga havnarmannin við pappírsblokki og blýanti í hond! – Eg havi teknað síðani eg var smádrongur, alt millum himmal og jørð. Men kanska serstaliga karrikaturar av andlitum sigur Ovild, sum annars fegnast um Tórshavnar Kvøldskúla, sum hevur verið honum so hollur gjøgnum 15 ár, har hann hevur gingið til tekning og máling, silvurarbeiði og keramikk. –Tey plagdu at siga, tá eg var smádrongur: "Gev Ovild pappír og blýant, so situr hann so pinnastillur, sjálvt meðan allir javnaldrarnir kríggjast" tekur Olvild til, tá vit vit-jaðu hann í heiminum í Djóna við Geilsgøtu. Á framsýningini í Smiðjuni verða umleið hálvthundrað tekningar, sum fyri fyrstu ferð verða vístar fram. Sjálvur kallar teknimeistarin tær fyri frítíðartekningar.

Føðingardagin í næstu viku er "opið hús" í Losjuni við Tinghúsvegin, frá kl. 17.00, har familja, vinir og kenningar eru vælkomin.

## Námsfrøði nú og í framtíðini

**Pedagogfelagið skipar fyri námsfrøðiligari ráðstevnu 13. og 14. september**

TÍÐINDASKRIV

Í sambandi við at Føroya Pedagogfelag gjørdist 25 ár 1.juni í ár, verður skipað fyri eini ráðstevnu á Hotel Føroyum fyri limum felagsins 13. og 14. september.

Høvuðsevnið á ráðstevnuni er "Námsfrøði nú og í framtíðini". Við hesum vilja vit vísa á arbeiðið, sum verður gjørt í dag og hugsjónina um, hvussu vit í framtíðini kunnu gerast betri, soleiðis at vit eisini vinna størri virðing fyri okkara fakliga virksemi.

Vit leggja dent á at lýsa námsfrøðiliga arbeiðsøkið frá fleiri ymiskum sjónarhornum, soleiðis at evnini á ráðstevnuni fevna um so nógvar av limum okkara sum gjørligt. Hugsanin við ráðstevnuni er eisini at varpa ljós á námsfrøðiliga fakbólkin í føroyska samfelagnum og soleiðis vísa á týdningin og dygdina í pedagogiskum arbeiði.

Skráin er tískil sera fjølbroytt og spennandi.

Katrin Petersen, fyrsta forkvinna fyri Føroya Pedagogfelag, setir stevnuna. Síðani vera royndir og áhugaverdir fyrilestrahaldarar sum John Andersen, cand.psych. og Henrik Helweg, stjóri í fyritøkuni Partnermanagement, á skránni. Royndir og dugnaligir føroyskir námsfrøðingar sum Guðrun Winthereig Rasmussen, Gunrid á Plógv og Hanna Rubeksen, fara at hugleiða um námsfrøðiliga dygd í mun til teirra dagliga arbeiði. Turid Olsen, heilsurøktarfrøðingur fer, saman við Súsonnu Holm, námsfrøðingi, at viðgera úrslitið av eini kanning Turid hevur gjørt um námsfrøði í Føroyum.

Seinra dagin er Salome A. Thorisdóttir, forkvinna fyri Íslendska pedagogfelagið fyrst á skránni. Eftir hetta fer Guðrun Eysturlíð, pedagogur, at tosa um menniskjasýnið og relatiónsarbeiðið. Fakligi parturin av ráðstevnuni endar við Dánial Hoydal, tekstahøvundi, sum fer at tosa um retorikk og námsfrøði.

Fólk frá Tjóðpalli Føroya enda síðani ráðstevnuna við eini stuttligari mentanarframførslu.

Tilmeldingarblað er at finna í blaðnum. - Luttøkugjaldið er kr.2.000 íroknað mat og kaffi báðar dagarnar. Seinasta freist at tekna seg til ráðstevnuna er mánadagin 03. september.

TRYGD • TÆNASTA • TRIVNAÐUR
- størri TRYGGLEIKA í ferðsluni

SKRIVSTOVUFÓLK

**Søkt verður eftir skrivstovufólki til Akstovuna til at byrja skjótast tilber. Talan er um parttíðarstarv.**

UPPGÁVAN
Uppgávan fevnir m.a. um:
- Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
- Sýnsumsiting

FØRLEIKAKRØV
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Dentur verður lagdur á at ein hevur góð samstarvsevni og at viðkomandi er fyrikomandi og tænastuhugaður. Kunnleiki at arbeiða við teldu er eisini ein treyt.

SETANARTREYTIR
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jákup Jacobsen, stjóra, á telefon 350400.
Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skulu verða okkum í hendi í **seinasta lagi 20. august 2007.**

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjald og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn, hevur Akstovan sýnsdeildir kring alt landið. Á Akstovuni starvast 20 fólk.*

AKSTOVAN
Hoyvíksvegur 57 • Postsmoga 3206 • FO-110 Tórshavn
Tel. 35 04 00 • Fax 35 04 01 • www.akstovan.fo • akstovan@akstovan.fo

